## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Minningarorð um Andrias á Markagili

Viðhvørt havi eg hug at hugsa, nú slapp hann endiliga heim til Harran, tá ið eg hoyri deyðsboðini av einum, sum hevur ligið óhjálpin leingi, og sum kanska slett ikki reiðuliga hevur verið í hesum heimi reint mentalt seinastu tíðina. Tó, tað havi eg ikki rætt til sum menniskja, tí eg eri ikki harri yvir lívi og deyða og eg havi einki við at gera, nær løtan er komin hjá mínum medmenniskjum.

Tó havi eg havt ilt af farbróður hesi seinastu fimm árini, nú hann hevur ligið lammaður á røktarheiminum, og slett ikki hevur verið førur fyri nakað sum helst. Havi havt ilt av, at hesin maður, sum var so glaður fyri at vera saman við fólki, nú sat kleppaður í koyristóli, og var fullkomiliga givin upp í hendurnar á røktarfólkunum.

Og eg havi hugsað nógv, um hvat Gud vildi læra Andrias, nú hann lá sum sum eitt barn og illa nokk orkaði at tosa og fylgja við hvat hendi uttanfyri gluggarnar á røktarheiminum. Og meira eg havi hugsað um hetta, tess minni veit eg, tí Guds vegir eru ikki mínir vegir, og tó veit eg, at tað Gud vil, altíð førir til tað góða. Mánakvøldið slapp hann og nú er Andrias millum tað hvíta lið, sum Brorson so vakurt yrkir um í sálminum »Eitt snjóhvítt herlið er at sjá« Brorson hevur fingið íblásturin úr Opinberingini í 7. kaptili ørindini 9-17, og fyrsta ørindi verður her endurgivið í máttmiklu týðingini hjá Janusi skaldi:

*Eitt snjóhvítt herlið er at sjá*
*sum túsund fjøll við kava á*
*um alla vídd*
*við pálmum prýtt*
*við song´ Guðs hástól' hjá.*
*Tað er hitt vígda lið, sum vann.*
*tá stríð um allan heimin brann,*
*og tváað stóð*
*í lamsins blóð*
*og himnasælu fann*
*Har halda tey nú halgan fund*
*og takkarsong á hvørji stund;*
*eitt samfallsljóð*
*sum várloyst flóð*
*til Guds kvað teirra lund*

Tað er Andrias á Marknagili skrivað verður um. Hann var føddur í Oyndarfirði 19. august 1918, elsti sonur Magninu og Jústinus Ejdesgaard. Tey bygdu upp á Marknagili í Oyndarfirði og fluttu inn sum nýgift í 1916. Húsini stóðu einsamøll uppi í bønum og her vóru teir fyrstu dagarnir av teimum 84 árunum hjá Andriasi livdir, í fjálgan við móðurbróst, nógvari andaligheit og vælstandi, tí føroyingar vunnu eisini pening undir fyrra kríggi og abbi var skipari.

Og so fór hann til skips. Helt seg í hølunum á pápanum tey fyrstu árini og var síðan við øðrum skipum. Andrias var sjómaður um ein háls, honum dámdi væl at flóta og hóast heilsan andøvdi móti einum harðbalnum sjómannalívi, so legðist Andrias ikki uppi, fyrr enn hann hevði flotið væl og virðiliga eina hálva øld. Tá tú tosaði við Andrias um hansara ár á sjónum, so gekk ikki long tíð, fyrr enn steðgað varð á í vandasiglingini undir krígnum. Andrias sigldi nógv undir seinna heimsbardaga, og hetta kom at merkja hann alt lívið.

Sjálvur havi eg hugsað nógv um, hvat fekk menn til hesa hasardsigling og hvat var tað sum dró, sum var so týdningarmikið, at teir settu lív í vága fyri nøkur pund. Eg spurdi Andrias hendan spurning fyri ikki so langari tíð síðani, ein dagin inni á røktarheiminum. Tað sást beinanvegin, at hetta var ikki ein spurningur um veður og vind ella onkrar aðrar sjálvfylgiligheitir hjá okkum landkrabbum. Tár komu í eyguni, og hann hugsaði hart í sínum blóðtøppsrakta og skroypiliga heila. Og so kom svarið snøgt telgt og greitt: »Eg veit ikki Jústinus, vit gjørdu tað bara, vit sigldu, tí vit vistu ikki um annað enn at sigla.«

Andrias liggur undir loki meðan hesar reglur verða skrivaðar og eg hugsi um hansara alsk til skrivaða orðið og til pennin. Hann dugdi væl at skriva, hann dugdi væl at taka til, og hann hevur ríkað føroysk bløð við mongum gullkorni. Hann var eitt natúrtalent við penninum.
Eg hugsi um kærleikan hjá Andriasi til mín, sum eg havi merkt alt lívið. Tey fyrstu árini haldi eg, at tað var tað, at eg var uppkallaður ordiliga eftir abba, sum tann einasti í familjuni, ið gjørdi at hann forkelaði meg næstan uttan mátahald og



síðan gjørdi ikki verri, at eg valdi skriving sum mína yrkisleið. Og hóast lívsleiðin hjá mær á yngri árum mangan var, stikk tað øvugta av tí sum sum Andrias skilti við eina skilagóða lívsleið, so nartlaði tað ikki burtur av kærleika hans, heldur tvørtur í móti.

Andrias hevur lagt nógv góð klípi í mítt lív og akkurát nú, meðan eg skrivi, rennur fram fyri meg, hvussu góður Andrias var við tey menniskju, sum hann var góður við. Eg hugsi um teir menn, hann sigldi saman við, og teir har í millum sum gjørdust hansara vinir. Sum nýklaktur pensionistur, hevði hann eina tí størstu privatu telefonrokningina í landinum, tí hann helt regluliga sambandið við sín vinaskara og hesin var ikki lítil.

Andrias forgudaði sínar vinir, og vit sum kendu hann duga søgurnar uttan at um Jens Klæmint, um gamla Kjølbrø, um sítt ættfólk í Oyndarfirði og aðrar staðir, um vinirnar í Betestda, um Reyða Símin, um Jákup Wentzel í Kollafirði, um Victor Danielsen, Dávamennirnar, Godfred Thomsen í Gøtu, um Garðamenninar, um brøðurnar í Havn og kring alt landið og um so nógv onnur og kanska nógv týdningarmiklari, men sum ikki renna fram fyri meg akkurát nú.

Andriast flutti Klaksvíkar eftir kríggið og giftist við Linu hjá Klokkaranum, eitt ediligt og elskiligt friðarmenniskja og hóast hon nú hevur verið deyð í fleiri ár, so hoyri eg enn fyri mær hennara mjúku rødd, tá hon plagdi at taka telefonina á Bumahamri og siga: »Fimmhálvtrýssfimmhundraðogfimm og tjúvee.«

Andrias kom úr eini bygd, ið var fast meitlað í grundarsteinarnar á fólkakirkjuni, og hann kom úr einum andaliga virknum heimi, har bæði mamman og pápin vóru umvend og talaðu og bóru fram vitnisburð á møtum. Og í Klaksvík talaði andin til hann við eini heilt aðrari tungu og vekti hann upp til eitt nýtt lív, sum á mangan hátt, tá og eisini í dag, er ørvísi enn í fólkakirkjuni. Persónliga vekingin og nýggi andaligi heimstaðurin, Brøðrasamkoman, var eitt djarvt stig at taka hjá hesum unga oyndfirðingi fyri góðum hálvt hundrað árum síðan og tað hevur neyvan verið heilt uttan rembingar fyrstu árini, tí Lina hjá Klokkaranum var ikki minni knýtt at kirkjuni enn Andrias á Marknagili. Men at enda vann kærleikin, sum er størstur av øllum, og Andrias angraði ongantíð, at hann fylgdi síni samvitsku og kallan.

Sólin var ikki farin niður klokkan átta í kvøld uttanfyri í tí spírandi urtagarðinum í nýggju húsum okkara í Hoyvík, sum Andrias ongantíð vitjaði, tí hann legðist fyri ein vind, lammaður og fjøtraður heili fimm ár áðrenn hann slapp higani mánakvøldið. Og meðan sólin smeltaði niður í grótið á Húsareyni, tann æviga kelda til lív, sendi eg Andriasi ein heitan tanka, nú hann mót vestri var á flogi, til tað land, ið hann visti lá fyri framman. Hann var í góðum hondum á lívi og hann er ikki í minni góðum hondum, nú hann er deyður.

»Tú var mær ein góður farbróður, Andrias, vit síggjast!«

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**

# Poul á Fuglberg deyður



Hósnáttina 1. mei andaðist Poul Justinussen í Klaksvík, 84 ára gamal. Poul var føddur í Svínoy 20. mei 1918 og var miðlingasonur Anniku úr Yvirstovu og Olivur, bónda Uppi í Húsi. Hinir báðir synirnar hjá Anniku og Olivuri vóru Jutt, sum er føddur í 1916 og býr í Svínoy, og Karl, føddur í 1920 og deyður í 1972. Jutt tók við festinum Uppi í Húsi og seinni eisini við festinum í Yvirstovu. Hann giftist við Petru úr Svínoy, sum doyði stutt fyri jól í fjør. Karl varð lærari í Svínoy í mong ár. Hann giftist við Turið, sum er úr Kunoy.

Olivur doyði ungur av sjúku. Poul var ikki meira enn 6 ár, tá hann misti pápan.

Poul var sjómaður øll síni bestu ár. Hann var ikki rættiliga komin til mans, tá hann fór at rógva út við opnum báti saman við øðrum svínoyingum. Seinni fór hann til skips við Polo, sum mammubeiggin Símun hjá Póli førdi og átti saman við Kjølbro.

Saman við øðrum keypti Poul í 1946 Fuglberg úr Danmark, og henda stóra bátin átti hann og førdi í so mong ár, at í Klaksvík varð hann ikki kallaður annað enn Poul á Fuglberg.

Heimferðin úr Danmark við Fuglberg er tiltikin. Teir komu í januar mánað 1947, og ferðin gjørdist sera ring. Teir komu í ódnarveður, fingu ein øgiligan sjógv, og báturin vann ikki upp fyri holvingina, men gleið eftir hekkuni niður aftureftir, holvdist í hjólingini og reisti seg uppaftur á rættkjøl. Við øðrum orðum: báturin fór runt. Teir róku nú í ódnarveðrinum, til trolarin Norðbúgvin kom fram á teir 170 fjórðingar í ein landnyrðing úr Kallinum. Teir komu á Klaksvík 12 dagar eftir, at teir vóru farnir úr Danmark.

Poul á Fuglberg førdi stóra veiðu til lands. Hann gjørdi serliga nógv við at veiða upsa við snellu og var rokskipari í hesi veiðu.

Í seinnu helvt av fimtiárunum yvirtók Poul allan ognarrættin til Fuglberg. Í 1971 keypti hann eisini Soli deo Gloria og hevði so tveir bátar. Hann seldi Fuglberg í 1983 og Áarberg, sum hann kallaði hin bátin, í 1985.

Í 1947 giftist Poul við Elisabeth, kallað Betti, Højgaard úr Rituvík, og tey búsettust í Klaksvík. Hon var lærarinda í Klaksvíkar Skúla í mong ár.

Friður verið við minninum um systkinabarnið og gubban.

**Ása Justinussen**



# Tað er neyðugt at hugsa um umhvørvið



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum, fekk sær eitt ordiligt prát við Kristian Skannerup um ruskpressuna*

**Tað er ógbvuliga áhugavert, at ruskskipanir, sum hendan, eru at finna, sigur Eyðun, elttør, landsstýrismaður**

FISKIVINNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** Eyðun Elttør helt, at ruskskipanin hjá Kristiani Skannerup var serstakliga áhugaverd.

Og tað vóru tað eisini fleiri onnur, sum hildu, tí tað vóru fleiri á stevnuni, sum heitti á hann um at leggja leiðina framvið básinum hjá Mil-tek, tí tey hildu, at hetta var nakað, sum kundi brúkast í Føroyum.

Men tað er neyðugt at vit hugsa um umhvørvið og hetta er so ein skipan, sum bæði kann brúkast á landi og umborð á skipum.

Eisini reiðarar, vit tosaðu við, hildu at skipanin var áhugavert.

Teir eru samdir um, at tað líkist ongum, so nógv burturkast verður tveittí havið, so ein skipan sum hendan, eigur avgjørt at vera umhugsað.

# Bjóðar seg fram at rudda Føroyar

**Kristian Skannerup hevur sjálvur staðið uppundir hendur í burturkasti.Tað fekk hann at menna eina skipan, sum trýstir burturkast saman so at tað bara fyllir ein tíggjundapart. Hetta er ein skipan, sum kann fáa stóran týdning fyri fiskiflotan.**

FISKIVINNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*



*Henrik Old, løgtingsmaður, vinstrumegin, EyðunElttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum í miðjuni vóru óvuliga áhugaðir í ruskpressuni hjá Kristian Skannerup*

**Sosialurin í Runavík:** At spara pening og samstundis verja umhvørvið.

Tað var eitt loysunarorð hjá Krsitian Skannerup á fiskivinnustevnuni í Runavík hesa vikuna.

Tað hevur altíð verið vanlig hugsan, at tað er alt ov dýrt at seta tiltøk í verk, sum hava til endamáls at verja umhvørvið.

Men hesa mýtuna ger hesin sami Kristian upp við.

– Veruleikin er tann, at 90% av vanligum burturkastið er luft. Og eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til at betala pening fyri at flyta luft aftur og fram, sigur Kristian Skannerup.

Kristian er ein vinnulívsmaður, sum er komin burturúr ongum og sum byrjaði á berum.

Hann arbeiddi í eina Keypssamtøku í 15 ár.

– Í eini keypssamtøku er nógvburturkast og eg havi mangan staðið uppundir hendur í burturkasti. Tað fekk meg at hugsa um at gera eina skipan til at trýsta burturkastið í okkara egnu keypsamtøku saman við.

Fyribils er tað endað við, at hann nú undir navninum Mil-tek, sum er ein stytting av Miljø teknik, hevur 40 deildir í ymsum londum og að so langt burtur sum í Avstraliaog í japan. Og nú er hann eisini komin til Føroya, her tað er Esmar Simonsen, sum umboðar hann.

Tí hevur hann gjørt eina pressu, sum trýstir alt vanligt burturkast saman, so at tað bara fyllir í mesta lagi ein tíggjundapart av tí, sum tað gjørdi upprunaliga.

Burturkastið, sum talan her er um, er papp og pappír, plast og flamingo, sum er nógv tað mesta av burturkastinum.

Hann sigur at hóast hetta er ein íløga uppá ímillum 25.000 krónur og 50.000 krónur, er tað ein íløga sum betalir seg rættiliga skjótt aftur.

Samstundis er tað ein íløga og ein skipan, sum bæði tann lítli bakarin og tað stóra virkið fáa gagn av.

– Útreiðslurnar til at leiga ruskbingjur, til flutning og til brenning, er so stórar, at verður ruskið trýst saman, so at tað lítið og onki fyllir, sparir tað so so nógv, at tað betalir seg aftur rættiliga skjótt.

Samstundis er gongdin tann, at útreiðslurnar til at beina rusk burtur, eru alsamt hækkaðar seinastu árini og tað er onki sum bendir á, at tað fer at ganga hinvegin aftur.

Sjálvsagt ber eisini til at skilja ruskið, so at tað, sum skal brennast er fyri seg og tað, sum skal endurnýtast, er fyri seg.

– Og so verjir tað eisini umhvørvið, leggur hann afturat.

### Vælegnað til skip

Seinastu tíðina hevur nógv verið tosað um burturkast frá skipum og Kristian Skannerup sigur, at hansara skipan er sera vælegnað til júst skip.

– Fyri tað mesta eru tað virki á landið, sum hava verið áhugað í skipanini, men vit síggja eisini at skipini eru ein veksandi marknaður og teir hava eisini selt hesaruskskipanina umborð á oljupallar.

– Okkara útgerð er úr rustfríum stáli. Tær hava ongar hydrauliskar pumpur, men ganga allar við luftrýsti, sum øll skip hava umborð.

– Tí eru tær einfaldar og har er lítið at verða í ólagi og sostatt krevja tær eisini ógvuliga lítla røkt.

Hann sigur, at áhugin hjá sjófólkið fyri umhvørvisvernd er alsamt veksandi.

Hann sigur, at hetta er fyrstu ferð at hann er á stevnu og hann hevur ikki angrað, at hann kom við.

– Hetta hevur verið stak áhugavert. Fólk eru ógvuliga blíð og fryntlig og hugburðurin mótvegis umhvørvisvernd er positivur.

– Innanst inni vita sjómenn sjálvandi, at teir eiga at taka burturkastið heim aftur við sær, tí tað burturkastið, teir tveita fyri borð, fáa teir aftur í høvdið, tí tað rekur aftur á land á teirra egnu Strendum.